"Um alt hevði ongan týdning - ja, so gerst ikki við":

# Fiskimannafelagsvalið var

**– Tað er einki yvir at dylja, at formansvalið í Føroya Fiskimannafelag var eitt dyggiligt misálit á meg sum formann og samstundis ein undirkenning av mínum lívsverki í felagnum. Hetta misálit var ikki minni dyggiligt av tí, at eg fekk minstu undirtøkuna av trimum uppstillaðum – ella bert 30% av atkvøðunum. Hetta var eitt rættiligt vónbrot, sigur Óli Jacobsen, ið sum formaður tænti fiskimonnum í samfull 36 ár. Sosialurin hevur skift orð við fyrrverandi formannin í Føroya Fiskimannafelag**




PRÁT
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Tað er ein partur av demokratinum í einum felag at hava val, og hevur sitandi formaður ikki gjørt tað nóg gott, er tað sjálvsagt at velja ein nýggjan. FF hevur tað fram um onnur feløg, at limirnir við uratkvøðu velja formann og stjórnarlimir. Men hóast hetta, noyðist eg at undrast yvir gongdina hesa ferð.

Tað sigur Óli Jacobsen, sum nú er fyrrverandi formaður í Føroya Fiskimannafelag.

Í fyrsta lagi hevur hann hug at vísa á, at árið 2006 hevur verið eitt tað besta árið hjá fiskimonnum yvirhøvur, og at teirra umstøður neyvan nakrantíð hava verið betri.

- Men sum í politikki eru tó altíð øki, sum bøtast kann um, og har FF eisini hevði førleikan til tess.

> **Vit hava sjálvsagt roynt at havt partarnar so høgar sum gjørligt, men samstundis hevur verið umráðandi, at veiðan bar til, tí annars vóru eingi arbeiðspláss til fiskimenn…**

**Uppstillingin**

Óli vísir á, at hann hevði tvey mótvalevni til formansvalið hesaferð, Dan R. Petersen og Jan Højgaard, og hesa síðuna í málinum lýsir hann soleiðis:

- Annar var í fyrsta lagi uppstillaður av manningum á partrolarum, sum avgjørt vóru á ovasta endanum av hesum flota, bæði tá ið ræður um skip og inntøkur. Hetta var eisini galdandi fyri arbeiðsumstøðurnar við kryvjimaskinum, sum vit hava barst fyri og ísgerð umborð, sum vit eisini hava stimbrað og sum lættir sera nógv um arbeiðið hjá manningini.

Hitt valevnið, sigur Óli, var fyrst og fremst stillað upp av manningum á ísfiskalínuskipum.

- Eingin bólkur av fiskimonnum hevur fingið so stóran ágóða av virkseminum hjá FF sum júst hesir. Sáttmálin er munandi bøttur, eitt nú við hægri manningarparti í míni tíð, eins og tann økta inntøkutrygdin er komin hesum bólki mest til góðar vegna ofta lágar inntøkur.

Óli vísir á, at virksemi hjá FF at fáa kapping um fiskaprísin, er mest komið teirra fiskasløgum sum toski, hýsu, brosmu og longu, til góðar.

- Vit hava barst fyri at varðveita teirra fiskidagar, ikki minst í 2006 við hjálp frá einum tí fremsta útlendska fiskivinnuserfrøðinginum, sum serliga mælti frá at minka um fiskidagatalið hjá línuflotanum.

Aftrat hesum hevur FF stuðlað undir bøttum arbeiðsumstøðum hjá línuflotanum, sum nú gera tað møguligt hjá manningini at ganga tveyskiftisvakt, sum áður bert var ein dreymur.

Umframt hetta eru fyrimunirnir í skattingin, sum Óli nertur við seinni í samrøðuni.

**Rekingin til valið**

- Munurin millum tann, sum situr í einum sessi, sum er uppá val og avbjóðararnar, er, at tann, sum situr, hevur sín egna førleika at vísa til, meðan hinir hava frítt slag. Hini bæði mótvalevnini hava bert víst ein førleika, og tað er "at reka" atkvøður, sum er eitt heilt nýtt fyribrigdi við valum í FF.

Óli er avgjørdur, tá hann sigur, at valdi formaðurin, Jan Højgaard, førdi seg fram við sjónarmiðum, sum greitt vístu, at hann yvirhøvur einki kendi til tey mál, har hann lovaði fiskimonnum "gull og grønar skógir".

- Hetta váttaði hann eisini á sínum fyrsta degi sum formaður, tá hann í miðlunum segði seg yvirhøvur ikki at hava sett seg inn í tey mál, har hann annars førdi seg fram sum serfrøðingur undan valinum.

> **Daglønin við nýggjaru nótaskipunum hevur í miðal verið 5 arbeiðaradaglønir á 900 krónur. Nú frætti eg, at tað vóru fiskimenn, sum ynsktu nýggjan formann, tí teir ikki fingu seks daglønir um dagin..**

Taka vit hansara høvuðsmál, sum var tryggingarviðurskifti, vísir Óli á, at hesi viðurskifti segði hann seg nú einki at vita um – og enn minni hevði hann nakað ítøkiligt uppskot á økinum.

Fyrrverandi formaðurin ásannar, at hann einki serstakt gjørdi sjálvur, meðan valið stóð upp á.

- Eg visti, at fiskimenn, um teir vildu, vistu, hvat eg stóð fyri.